## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og stundum sirm ella mjørki. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, um kvøldið upp í ein strúk. Sólglottar, men okkurt ælið og hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Um morgunin upp í hvassan vind av suðri og regn. Seinni andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men sunnudagin minni vindur av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 13 stig.

# Ordeliga vanadannandi egg

**Við jøvnum millumbilum stendur Jóhan í Kollafirði í rundkoyringini í Kollafirði og selur føroysk egg. Ella sum hann sigur sjálvur: Ordelig egg. Eftirspurningurin er øgiligur, og eggini ganga sum heitt breyð**

EGGSØLA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Mánadagin stóð Jóhan aftur í rundkoyringini og seldi egg. Tá hann hevði selt so nógv, at hann hevði nóg mikið til fóður, gavst hann. Men hann sigur, at hann væl hevði kunnað selt øll, sum tað skuldi verðið. Men tað tímdi hann ikki.

– Sært tú, mær dámar so væl at standa í rundkoyringini og selja egg, men tað er so ræðuliga keðiligt, tí fólk koma allatíðina, og so er alt uppi, áðrenn eg veit av. Og so er tað so longi, til eg sleppi aftur í rundkoyringina, sigur hann.

Jóhan veit ikki sjálvur, um eggini eru góð. Tí hevur hann eitt skelti, har hann hevur skrivað ordelig egg á. Men hann leggur dent á, at eggini eru so góð, sum tey kunnu verða, tí tey eru komin undan hønum, sum ganga fríar úti í náttúruni, har hugnin verður settur fram um framleiðsluna.

Sambært Jóhan stendur hann ikki í rundkoyringini við sølufremjandi vinningi fyri eygað.

– Men so løgið, sum tað ljóðar, so slær tað feil hvørjaferð, tí fólk ringja í dagavís og spyrja eftir egg-um, eftir at eg havi staðið har, greiðir hann frá.

Jóhan sigur, at fólkini, sum steðga fyri at keypa, eru øll so glað, og tey hava øll roynt at steðga á í til dømis Danmark fyri at keypa jarðber ella okkurt annað.

– Eg merki ikki so nógv til fólk, ið ikki dáma, at eg standi har, tí tey koyra vanliga bara framvið uttan at steðga, sigur Jóhan, sum at enda leggur afturat, at hann umhugsar av álvara at seta ein reyðan trýkant á eggjapakkarnar, tí tað letur til, at eggini eru serstakliga vanadannandi.

– Eg veit bara, at tey, sum keypa, koma aftur og aftur og aftur at keypa meira, sigur Jóhan Dalsgaard.




*Eg havi bara eitt lítið skelti standandi í rundkoyringini, har tað stendur egg á. Ongin pílur ella nakað, tí eg havi funnið útav, at lægri profil eg haldi størri verður áhugin, sigur Jóhan í Kollafirði*
*Mynd: Jens K. Vang*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 18 |
| Tromsø | 13 |
| Bergen | 16 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 20 |
| Keypmannah. | 16 |
| Helsinki | 18 |
| Moskva | – |
| Berlin | 16 |
| Warzawa | 26 |
| Kiev | 27 |
| Bukarest | 27 |
| Paris | 19 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 30 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 17 |
| New York | 26 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | – |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Ein hátrýstryggur, 1016 hPa. yvir Føroyum fer eystureftir. Eitt lágtrýst, 978 hPa. eystan fyri Hvarvið fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikumorgunin.




Lágtrýstið vestan fyri Ísland stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani til Føroya fer spakuliga í landnyrðing.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 30/08 kl. 06⁰⁰–31/08 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,2°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° - Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 30/08 kl. 06⁰⁰–31/08 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 54,7 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

27. aug.: Mánin næstur jørðini
30. aug.: Fullmáni
6. sept.: Seinna kvarter
8. sept.: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. sep | 09.08 | 21.29 | 08.08 | 20.29 | 08.23 | 20.44 | 11.08 | 23.29 | — | 12.08 | 07.23 | 19.44 | 06.23 | 18.44 | 09.23 | 21.44 | 10.23 | 22.44 | 08.53 | 21.14 | 10.08 | 22.29 |
| 2. sep | 09.51 | 22.12 | 08.51 | 21.12 | 09.06 | 21.27 | 11.51 | — | 00.29 | 12.51 | 08.06 | 20.27 | 07.06 | 19.27 | 10.06 | 22.27 | 11.06 | 23.27 | 09.36 | 21.57 | 10.51 | 23.12 |
| 3. sep | 10.33 | 22.54 | 09.33 | 21.54 | 09.48 | 22.09 | 00.12 | 12.33 | 01.12 | 13.33 | 08.48 | 21.09 | 07.48 | 20.09 | 10.48 | 23.09 | 11.48 | — | 10.18 | 22.39 | 11.33 | 23.54 |
| 4. sep | 11.16 | 23.38 | 10.16 | 22.38 | 10.31 | 22.53 | 00.54 | 13.16 | 01.54 | 14.16 | 09.31 | 21.53 | 08.31 | 20.53 | 11.31 | 23.53 | 00.09 | 12.31 | 11.01 | 23.23 | — | 12.16 |

5 707265 100036 >